# Trý í starvsvenjing




*Tey trý - Asger K. Eið Jensen og Anna Kathrina G. Mortensen av Tvøroyri og Andrias Gærdum av Strondum – eru her avmyndaði saman við Sosialbilinum Snar við tunilsmunnan til Gásadal*
*Mynd: Snorri Brend*

Henda seinasta mánaðin hava vit á Sosialinum havt fleiri praktikantar.

Teir hava verið úr Stranda skúla og úr skúlanum á Tvøroyri.

Saman við blaðfólkum og myndamonnum hava tey fingið eitt innlit í, hvussu eitt nútíðar blað og eitt nýtt miðlahús virka í tí dagliga.

Tey hava eisini verið fleiri túrar úti við blaðfólkum í tænastuørindum, m.a. í Vágum og í Klaksvík.

Henda eina dagin vóru tey við einum av tíðindafólkum okkara so langt vesturi sum í Gásadali, haðani henda myndin er tikin.

Hetta var ein serstøk uppliving fyri tey, ikki minst tí at teimum varð vístur slíkur blíðskapur av eini eldri hjúnum í bygdini.

Starvsvenjingin endar í dag, og í næstu viku byrjar skúlagongdin aftur.

# Næmingar í starvsvenjing

**Vit hava tosa við tríggjar næmingar, ið eru í starvsvenjing í Havn. Tær eru allar av Tvøroyri og ganga í 9. flokki.**

*Orð/myndir: Asger K. Eið Jensen (praktikantur)*
*Anna Kathrina G. Mortensen (praktikantur)*

## – Sleppi at royna nakað nýtt



**Navn:** Maria Vang.
**Bygd/bý:** Tvøroyri.
**Arbeiðsstað:** Poul Hansen og Jónfinn Thomsen, sakførarar í Havn

*Hví valdi tú júst hetta arbeiðsplássið:*
– Tí hetta hevur mín áhuga og kanska ætli eg mær at verða sakførari í framtíðini.

*Hvat dámar tær at vera her:*
– Her er fínt at vera og mær dámar tað væl, tí tað er sera spennandi at royna okkurt nýtt.

*Hvat hevur tú gjørt higartil:*
– Eg havi skrivað dømi um eina stevning og verið í rættinum til rættarting.

*Hvat gert tú beint nú:*
– Eg eri nýligani komin aftur. Eg havi verið við í rættinum og lurtað eftir einari sak.

*Kundi tú hugsað tær at arbeitt við hesum í framtíðini:*
– Ja, tí tað virkar sum eitt áhugavert arbeiði. So hevði helst vilja verið sakførari.

*Gleðir tú teg at fara í skúla aftur:*
– Bæði ja og nei.

*Hvussu er at vera í Havn:*
– Eg haldi at tað er fínasta slag, tí ein fer møguleika at passa seg sjálvan og taka egna ábyrgd.

## – Gleði meg at fara í skúla aftur



**Navn:** Rakul Motrensen.
**Bygd/bý:** Øravík.
**Arbeiðsstað:** Tjaldurs Apotek í Havn.

*Hví valdi tú júst hetta arbeiðsplássið:*
– Eg valdi tað, tí eg helt tað vera áhugavert at arbeiða við medisini o.s.fr.

*Hvat dámar tær at vera her:*
– Mær dámar tað ógvuliga væl.

*Hvat hevur tú gjørt higartil:*
– Eg havi skrivað receptir, sett uppá hillarnar og annars bara hjálpt til.

*Hvat gert tú beint nú:*
– Beint nú leiti eg eftir vørum, skrivi receptir.

*Kundi tú hugsað tær at arbeitt við hesum í framtíðini:*
– Tað er ringt at svara uppá, men alt kann henda.

*Gleðir tú teg at fara í skúla aftur:*
– Ja, og mær leingist eftir vinum og familju har suðuri.

*Hvussu er at vera í Havn:*
– Mær dámar tað væl. Tí eg læri at ansa uppá meg sjálva og starvfólkini er sera blíð og fitt. Eg vil heita á onnur um at fara her, tí her er bæði læruríkt og stuttligt.

## – Gleði meg IKKI at fara í skúla aftur




**Navn:** Ása Johanna Pólsdóttir.
**Bygd/bý:** Øravíkarlíð.
**Arbeiðsstað:** Fløgudeildin í SMS.

*Hví valdi tú júst hetta arbeiðsplássið:*
Tí eg vildi sleppa at arbeiða í einum handli og helt tað virkaði cool at arbeiða við fløgum.

*Hvat dámar tær at vera her:*
– Super, tí tey eru ordiliga blíð, fitt og skemtingarsom.

*Hvat hevur tú gjørt higartil:*
– Eg havi prísað, staðið við kassan, koyrt fløgur uppá pláss, gjørt top 10 og gjørt reint

*Hvat gert tú beint nú:*
Eg prísi og seti alarm á fløgurnar.

*Kundi tú hugsað tær at arbeitt við hesum í framtíðini:*
– Nei, tí tað er ikki so áhugavert at arbeiða við hesum.

*Gleðir tú teg at fara aftur í skúla:*
Nei, avgjørt ikki.

*Hvussu er at vera í Havn:*
– Tað er super, tí her eru er meira at gera og mær dámar tað sera væl.